## Eftir Tinghúsvegnum

Í sambandi við Mentanarnáttina 1. juni skipar Kunningarstovan í Havn fyri einum gongutúri oman eftir Tinghúsvegnum, sum er ein av teimum gomlu gøtunum í Havn og er úr Gundadali oman á Vaglið. Kunningarstovan sigur, at nógv er broytt fram við Tinghúsvegin upp ígjøgnum árini, og á túrinum er ætlanin at taka tað gamla framaftur. Tey, sum hava hug at ganga oman eftir vegnum, skulu møta uppi hjá Buglu-Jensen kl. 19.15.

## Ovbyrjaðir prestar

Føroyskir prestar eru ovbyrjaðir og kenna seg strongdar, sigur formaðurin í føroyska prestafelagnum, Jákup Reinert Hansen, við Útvarpið. Hann vísir á, at fleiri prestar eru farnir í farloyvi í seinastuni, og at avloysarar ikki eru settir enn. Tað ger, at hinir prestarnir hava ov nógv at gera. Heri Joensen, prestur í Suðurstreymoy, sigur við Útvarpið, at teir áttu at verið fýra prestar í vestara prestagjhaldi. Hann er einsamallur í løtuni.

# Kaldbaksvegurin skal gerast munandi tryggari

**Alt ov nógv álvarsom ferðsluóhapp henda eftir tí 10 km. langa Kaldbaksvegnum. Men nú er nóg mikið: Ein royndarverkætlan um at tryggja ferðsluna munandi byrjar longu í komandi viku**

FERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Landsverk:** Hvønn einasta dag koyra millum 5000 og 8000 bilar eftir Kaldbaksvegnum.

Vegurin er væl úr hondum greiddur, men tað vísir seg kortini, at hetta er eitt av teimum vegastrekkjunum har tað henda sera nógv ferðsluóhapp.

Í eina tíð hevur verið arbeitt við eini ætlan um, hvussu ein kann gera hetta vegastrekkið tryggari. Nú verður farið til verka við ymiskum broytingum fyri somuleiðis at tálma skjótu ferðsluni.



*Kaldbaksvegurin skal gerst tryggari. Í fleiri støðum verður ikki loyvt at yvirhála í rættiliga longum strekkjum. – Flestu óhappini henda, tá bilar møtast, við vegamót, í hálku ella um seyður er á vegnum, sigur Heini Eysturoy, leiðari á vegadeildini hjá Landsverki*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í fyrsta lagi verður talan um eina nógv betri uppmerking at leiða ferðsluna við. Í øðrum lagi verður yvirhálingin ikki loyvd á fleiri longri strekkjum.

Nú verður á fyrsta sinni roynt at gera sonevndar rumlistrípur eftir øllum vegnum, bæði við vegjaðaran og eftir miðjuni av vegnum. Alt hetta verður gjørt fyri at forða ferðsluóhappum og vanlukkum á vegnum.

- Eydnast hetta væl, er ikki óhugsandi at vit gera eina líknandi verkætlan onkra aðrastaðni, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

Fyrrapartin varð henda royndarverkætlan løgd fram. Hon verður sett í verk longu í komandi viku og verður liðug í summar.

Kostnaðurin er mettur til 300.000 kr. Men hesin peningurin er væl givin út, tá hugsað verður um endamálið, sum er at minka um talið av óhappum mest møguligt.

### Broyta atferð

Arbeitt hevur verið við hesum verkætlanini í eina tíð. Hetta er alt gjørt í samstarvi við allar myndugleikar, sum hava við ferðslu og trygd at gera.

Serligar broytingar verða gjørdar við tey mongu vegamótini, til dømis til Kaldbak, Sandvíkahjalla og Hvítanes.

Hin stóri spurningurin er, hvussu hetta fer at ávirka bilførararnir: – Er nøkur trygd fyri, at teir fara at fylgja øllum hesum nýggju ásetingunum?

- Tað ætla vit, at teir fara at gera, sigur Høgni í Stórustovu, formaður í nevndini fyri Ferðslutrygd um hetta nýggja frambrotið í føroysku vegasøguni.

– Neyðugt er at bilførararnir snøgt sagt fara at broyta atferð!

Teir, ið hava lagt vegin hava gjørt sítt arbeiði, men nú er upp til tann einstaka bilføraran at fylgja teimum nýggju merkingunum, sum verða settar fram við vegnum.

– Bilførararnir mugu gerast bevístir um ferslutrygdina, og at teir tí vilja taka ímóti boðskapinum, sum er givin teimum, sigur Høgni.

Víst verður á, at koyrir ein við 80 km. ferð um tíman, tekur tað bert 7 ½ minutt at koyra úr Kaldbakstunlinum og suður til fyrstu rundkoyringina. Koyrir ein hinvegin 90 sparir ein bert 50 sekund.

Hinvegin kenna mong til trupulleikan, at ein bilur koyrir seint frammanfyri. Koyrir hesin 70 km. um tíman, so missir ein bert 64 sekund!

Meiri nágreiniligt verður sagt frá ætlanini í einum seinni blaði.

# Rætta hurðin til íverksetarar

**Á samkomu í býráðshøllini í Klaksvík í morgun varð fyrsta Íverksetarahúsið í Føroyum alment tikið í nýtslu. Undir framløguni greiddi Rani Nolsøe, leiðari í Íverksetarahúsinum frá gongdini higartil. Hann vísti á, at higartil hava tey havt samband við slakar 30 áhugaðar íverksetarar.**

ÍVERKSETARAHÚS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** – Fleiri teirra hava leingi ligið inni við góðum hugskotum. Spurningur teirra hevur verið, hvar tey skuldu venda sær fyri at fáa góða ráð víðari.

– Íverksetarahúsið í Klaksvík er rætta staðið fyri hesi fólkini. Tey verða ikki víst á dyr, men vit kunnu tvørturímóti hjálpa teimum at lata dyr upp, soleiðis at tey av álvara sleppa til verka, sigur Rani Nolsøe.

Í umhvørvinum í Íverksetarahúsinum fáa nøkur týðandi amboð og góð ráð, samstundis sum ein kemur at vera saman við øðrum fólkum við sama áhuga.

Trý netverk eru virkin í Íverksetarahúsinum, sum nú er sett alment á stovn.

Eftir at hugskotið um íverksetan og eitt íverksetarahús í Klaksvík kom, hevur nógv orðaskifti verið millum vinnulívsfólk, Menningardeildina hjá kommununi og Vinnulívsráðið í Klaksvík.

Hetta er nú endað við, at Klaksvíkar kommuna setur hetta íverksetarahúsið á stovn. Virksemið byrjaði við eini verkætlan í samstarvi við Birc Estate í Herning, og verkætlanin fór av bakkastokki 15. januar á einum íverksetarakvøldi í mentanarhúsinum Atlantis.

Síðani tá hava tvey fullteknað skeið í íverksetan verið hildin. Um somu tíð hava slakir 30 íverksetarar leitað sær ráðgeving her.

Trý íverksetaranetverk eru í løtuni virkin í húsinum. Fleiri verkætlanir fara væntandi í gongd í næstum, og so skjótt sum hølini verða tøk, fara íverksetarar at kunna leiga høli her.



*Rani Nolsøe, leiðari greiðir her frá íverksetarahúsinum í Klaksvík, har føroyskar íverksetarar skulu fáa góð amboð at arbeiða víðari við. - Neyðugt er at komandi íverksetarar vita, hvørja hurð teir skulu venda sær til. Hjá okkum er eingin skeiv hurð, sigur hann*

*Mynd: Jens Kr. Vang*